## Samstarva um veðrið

Forsetarnir í USA og Kina, Barack Obama og Hu Jintao, hava lovað at arbeiða saman fyri at tryggja, at nakað munagott skal spyrjast burtur úr altjóða veðurlagsráðstevnuni í Keypmannahavn seinni í ár. Tað samdust teir báðir um í einari telefonsamrøðu, sigur ein talsmaður fyri Hvítu Húsini. Barack Obama og Hu Jintao hava eisini nóg mikið at tosa um, tá tað snýr seg um útlát, tí júst USA og Kina eru tey londini, sum lata mest $CO_2$ út í luftina. Men sambært talsmanninum hjá Hvítu Húsunum eru teir báðir forsetarnir til reiðar at taka munagóð stig í sambandi við ráðstevnuna í Keypmannahavn.



## Vorðið sum lønarlækking

Stjórarnir í teimum stovnum og fyritøkum, sum fáa fíggjarliga hjálp frá amerikonsku stjórnini, fáa onga lønarhækking í ár. Tvørturímóti hevur Barack Obama, forseti, gjørt av at skarva nógv av lønini hjá teimum, sum nú liva av pengum frá tí almenna. Avgerðin hjá forsetanum ber millum annað í sær, at stjórarnir í Bank of America og General Motors og 175 aðrir stjórar kunnu missa heilt upp í 90 prosent av teirri løn, sum teir nú hava. Avgerðin hjá forsetanum hevur samband við, at nógvir amerikanarar hava verið sera misnøgdir við, at stjórarnir varðveittu ta góðu lønina, hóast fyritøkurnar máttu fáa almenna hjálp.

# Serfrøðin ósamd um koppsetingina

**Danski serlæknin í almennum medisini, Claus Hancke, hevur í donskum miðlum ávarað um, at koppsetingin inniheldur kyksilvur, sum er heimsins mest eitrandi, ikki-radioaktiva, nervaeitur. Statens Serum Institut sigur hinvegin, at kyksilvurinnihaldið er »mikroskopiskt«**



H1N1
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Tað eru ikki bert føroyskir kommunulæknar, sum eru ørkymlaðir um koppsetingina móti H1N1.

Í einum sjónvarpsinnslagi í tíðindunum hjá Danmarks Radio tann 23.09.2009, ávarar danski serlæknin í almennum medisini, Claus Hancke, um at koppingarevnið móti H1N1, Pandemrix, inniheldur kyksilvur.

Hann vísir á, at av logistiskum orsøkum er koppingarevnið konserverað við Thimerosol, sum er 58 prosent kyksilvur. Hann vísir eisini á, at kyksilvur er tað mest potenta ikki-radioaktiva nervaeitrið, og at tað upphópar seg í kroppinum og verður verðandi 20 til 30 ár, og at kyksilvurinnihaldið fullkomiliga broytir indikatiónsøkið, tí tað nú eisini skal takast hædd fyri hesum hjáárininum.

- Ein skal ongantíð geva eina viðgerð, ið er verri enn sjúkan, og fyribyrging skal vera við so lágum títtleika av hjáárinum, at hetta verður uppvigað av fyrimununum við fyribyrgingini, sigur Claus Hancke í einum responsum um koppsetingina.

- Sum lækni verði eg noyddur at síggja koppsetingina sum sjúkufyribyrging til einstaklingar og ikki sum fráverufyribyrging til samfelags- og framleiðslumaskinaríið. Eg kann tí ikki úttala meg um samfelagsbúskaparligu ávirkanina av at lata vera við at koppseta, staðfestir hann.

### SSI sigur tað øvuta

Statens Serum Institut heldur hinvegin ikki, at tað er nakar sum helst vandi við at nýta koppsetingina. Á heimasíðuni skriva tey, at thiomersal inniheldur eina kyksilvurbinding, (ethylkyksilvur) sum er øðrvísi frá tí, tú fært í matinum (methylkyksilvur). Munur er á hvussu hesi bæði verða niðurbrotin í kroppinum, í hvønn mun hesi verða upptikin í heilavevn-aðinum og í hvønn mun tey verða niðurbrotin til óorganiskt kyksilvur.

SSI vísir eisini á, at hetta evnið hevur verið nýtt í koppsetingum í umleið 60 ár, og at mongdin í Pandemrix er munandi minni enn eitt fólk vanliga fær úr matinum gjøgnum eina viku.

SSI sigur eisini, at koppingin skal gevast tvær ferðir, við minst trimum vikum millum báðar sproyturnar.

Niðurstøðan hjá Statens Serum Institut er tí, at koppingarevnið er vandaleyst at nýta, og at eingin orsøk er at óttast kyksilvurinnihaldið í Pandemrix.

# H1N1 ørkymlar

**Mótstríðandi upplýsingar um koppsetingina móti H1N1 og ógreið argument fyri at koppseta øll, eisini tey, sum longu hava havt sjúkuna, ørkymlar føroyskar kommunulæknar. Harafturat vil framleiðarin ikki standa inn fyri virknaði ella hjáárinum av koppseting. - Ódámligt, sigur Jenis av Rana, kommunulækni**





*Jenis av Rana, kommunulækni, heldur at argumentið fyri at koppseta móti H1N1, um at halda samfelagshjólini malandi, er for bíligt. Hann eftirlýsir medisinskum argumentum fyri at koppseta*

*Savnsmynd*

H1N1
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Føroyskir kommunulæknar eru sannførdir um, at H1N1 – fyrr kallað svínakrím – veruliga er úti millum føroyingar, og at tað eru sera nógv, sum hava havt sjúkuna.

Hetta er tó ikki nakað, ið gevur heilsuverkinum høvuðbrýggj, tí tað er leingi síðani heilsuverkið gavst at taka laboratoriiroyndir av øllum teimum, ið vísa sjúkutekin, og bert tekur sær av teimum, sum eru í vandabólkunum.

Fatanin millum flestu kommunulæknar er tó, at H1N1 blómar hesa tíðina, og at tað eru nógv fólk sum hava sjúkuna og leggjast sjúk við fepri í tríggjar til fýra dagar við teimum sjúkueyðkennum, sum eru fyri sjúkuna.

Tað er tó ikki útbreiðslan av sjúkuni, sum ørkymlar føroyskar kommunulæknar, men hinvegin koppsetingin og ætlanirnar við koppsetingini móti H1N1.

### Bílig argument

Sambært Jenis av Rana, politikara og kommunulækna, er tað ringt at fylgja argumentunum fyri at koppseta.

- Tað eru deildar meiningar um koppsetingina, og eg havi ringt við at fylgja argumentunum hjá landslæknanum. Eitt nú sigur hann, at tað er neyðugt at koppseta fyri at halda samfelagshjólunum koyrandi, men tað keypi eg altso ikki. Tað er for bíligt. Tað plagar at skula vera medisinsk argument fyri at koppseta, og ikki samfelagslig, vísir Jenis av Rana á.

Hann heldur eisini, at ætlanin at koppseta øll eftir tilbúgvingarætlanini, sjálvt tey longu hava havt sjúkuna, er burturvið.

- Eg havi ilt við at skilja hví mann eisini skal koppseta tey, frísk fólk, sum kanska longu hava havt sjúkuna, tí tey hava longu fingið ta bestu koppsetingina, ein kann fáa, sigur Jenis av Rana. Her sipar